gult22 cyan22 magenta22 svart22






**Blaðið hjá Føroya Ellisakførum fæst nú til keyps á øllum Shellstøðum kring landið. Blaðið kemur út fýra ferðir um árið og viðger alt, ið hevur við ellisakfør at gera**




# Tríggjar milliónir Skoda

Skoda bilverksmiðjan hevur framleitt tríggjar milliónir bilar, síðan VW yvirtók leiðsluna í 1991. Jubileumsbilurin varð ein silvurgráur Skoda Oktavia.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Hyundai til Russlands

BILAR

Hyundar Motor, Suðurkorea, hevur gjørt av at fara undir framleiðslu av bilum í Russlandi. Málið er at framleiða 70.000 bilar komandi fimm árini við modellunum Matrix, Accent, Santa Fe, Sonata og tann nýggja fýra-hjólstrekkjaran, Terracan.

Flestu lutirnir og komponentarnir koma úr Suðurkorea og verða settir saman á eini verksmiðju einar 1.000 km sunnan fyri Moskva.

Boðini um, at Hyundai fer undir framleiðslu í Russlandi koma frá leiðsluni hjá Hyundai á eini bilaframsýning í Moskva. Hyundai hevur selt góðar 17.000 bilar síðani 1991 gjøgnum sjey forhandlarar, men hevur júst skrivað undir sáttmála við eitt stórt felag í Russlandi, sum beinanvegin víðkar Hyundai-umboðini í Russlandi til 70.









gult23 cyan23 magenta23 svart23










